# Hei›ra›ur vi› peningagávu

*Lærararnir hildu so miki› av uppskotinum um eina granskingarstø› á Hvítanesi, at 26 ára gamli arkitekturin Ósbjørn Jacobsen úr Sy›rugøtu einsamallur fekk Vola-legati› á 20 túsund krónur*



Dia Midjord

Seinasta fríggjadag vór›u prógvini handa› á arkitektaskúlanum í Århuus. Millum teir 102 næmingarnar, i› spentir sótu og l‡ddu á rø›ur og anna›, i› hoyrir slíkari prófhandan til, sat 26 ára gamli Ósbjørn Jacobsen úr Sy›rugøtu. Hann hev›i, eins og allir hinir næmingarnir, lati› úr hondum eina verkætlan sum høvu›suppgávu.

Ta› er nevniliga solei›is, at eitt legat ella ein peningagáva ver›ur latin tí verkætlan, i› lærararnir á skúlanum meta er best frágingin. Talan er um eitt fer›alegat á 20.000 krónur frá Vola-verksmi›juni.

Ta› er kortini ikki so lætt at meta um, hvørt av uppskotunum er ta› frægasta, og tískil ver›ur legati› stundum b‡tt sundur til fleiri næmingar, sum á onkran serligan hátt hava skilt seg burturúr. Undir næstseinastu próvhandanini á skúlanum vór›u eitt nú tveir næmingar hei›ra›ir vi› 10.000 krónum hvør.

### Í posa og sekk

Men hesafer› var dómarabólkurin yvirhøvur ikki í iva. Uppskoti› frá føroyinginum Ósbirni Jacobsen, um eina granskingarmi›stø› á Hvítanesi, var so nógv ta› besta.

Ta› ber til at siga, at uppskoti› bæ›i vann fyrstu og a›ru vir›isløn, tí Vola-legati› bleiv ikki b‡tt sundur hesafer›. Arkitekturin úr Sy›rugøtu streyk einsamallur avsta› vi› teim 20.000 krónunum.

### Vi› omankoyringina

Ta› var 2. juni, at uppskoti› ella høvu›suppgávan var› latin inn og gó›ar tríggjar viku seinni vardi Ósbjørn uppgávuna fyri f‡ra próvdómarum. Ta› gekk sum smurt, og Ósbjørn fekk sína høvu›suppgávu gó›kenda.

Granskingarmi›stø›in fyri havumhvørvi› liggur ni›anfyri og naka sunnan fyri omankoyringina til Hvítanes. Uppskoti› fevnir um sjálvan bygningin, parkeringsøki› og eina atløgubryggju.

– Tíverri er ikki talan um eina verkætlan, i› skal fremjast í verki, so vit kunnu bert hei›ra Ósbirni vi› at klappa og geva honum Vola–legati›, stendur m. a. í grundgevingini frá skúlanum.

*Projektet til en Havmiljøforskningsstation på Færøerne fremstår med en kraft og en poetisk nerve som man kun måder i ganske få projekter, ikke bare her på skolen men også ude i den byggede verden. Projektet leger med horisonten samtidigt med at det indpasser sig smukt og med stor forståelse for stedets karakter. Ósbjørn Jacobsen evner at anvende funktionens iboende billede- og formmæssige potentialer og landskabets rolige åndedrag. Og han får det til at stå frem for os på smukkeste vis. Projektet er både i sin tænkning og i sin fremstilling på et meget højt niveau. Det er juryenens klare opfattelse at dette projekt med de revisioner et hvert projekt skal igennem, hvis det bygges, vil kunne blive et yderst smukt bidrag til Færøsk byggekultur. Desværre står projektet ikke umiddelbart overfor en realisering så vi må i stedet klappe og tildele det Vola-legatet.*

*Hetta er grundgevingin fyri, at Ósbjørn Jacobsen fekk Vola-legati›*

# Ung businessfólk kappast í Føroyum

Endakappingin í European Business Game, har sjey lond fara at kappast, ver›ur í Nor›urlandahúsinum komandi leygardag

Kappingin byrjar klokkan níggju og heldur fram til klokkan tvey seinnapartin, tá vinnarin ver›ur kosin.

Sjey bólkar luttaka í evropeisku endakappingini hesafer›. Hesi lond eru umbo›a›: Danmark, Ongland, Italia, Skotland, Slovakia, Kekkia og Føroyar.

# Fundast í Fuglafir›i

Fuglafjar›ar kommuna hevur 8 mál á skránni til b‡rá›sfundin í kvøld. Umframt tvær umsóknir um byggiloyvi›, skal b‡rá›i› eisini vi›gera tvær umsóknir um eykajáttan frá teknisku nevnd. Ein er til asfaltering og ein til burturbeining av jarni.

B‡rá›i› skal eisini taka stø›u til frítí›arundirvísingina fyri kvøldskúlan komandi vetur, og stø›a skal takast til, um royndaravtalan fyri barna & ungdómstannrøkt skal leingjast vi› einum ári.

Haraftrat skal Fuglafjar›ar b‡rá› taka stø›u til, um eitt mótmælisskriv frá havnanevndini skal sendast Vinnumálast‡rinum. Hon mótmælir løgtingslóg frá 9. mai í ár, sum gevur høvu›ssta›num einkarætt upp á eina markna›areftirlitisstø› fyri Føroyar.



# Vóru vi› lagnupallin

*ROSKILDEFESTIVALURIN. Havnama›urin, Magnus Sørensen, var ein teirra, i› lurta›i eftir lagnubólkinum, Pearl Jam*

Høgni Mohr

Magnus Sørensen úr Havn, sum er búsitandi í Keypmannahavn, var ein millum mangar føroyingar, i› var á Roskildefestivali.

– Vit vóru eina løtu vi› pallin, har Pearl Jam spældi. Og vit hoyrdu eisini, at ta› gekk vilt fyri seg. Einafer› rópti sangarin, at nú skuldu øll stíga aftur eftir. Og løtu seinni góvust teir at spæla og alt ljósi› var› tendra›. Tá vóru vit longu á veg burtur. Vit vistu ikki, hvussu hart ta› gekk fyri seg har frammi, grei›ir Magnus Sørensen frá.

### Vistu einki

Tí›indini um, at fleiri fólk høvdu lati› lív, komu ikki Magnusi fyri oyra› fyrr enn seinni um kvøldi›, tá i› hann var komin heimaftur í tjaldi›, har føroyingar hildu til.

Magnus Sørensen arbei›ir á fyritøkuni Telia, og ein av starvsfeløgum hansara stó› fremstur í rokanum undir konsertini. Hesin hevur greitt Magnusi frá, at hann var um at ver›a fanga›ur í trokanum, men at hann eftir miki› strí› slapp út.

### Fólk fóru heim

Eisini mongu føroyingarnir á festivalinum vóru illa vi› av tilbur›inum.

– Tá i› vit komu aftur til tjaldi›, høvdu fleiri bangin foreldur ringt úr Føroyum. Eg ringdi heim beinanvegin, sigur Magnus Sørensen úr Keypmannahavn.

Tá i› Magnus ringdi heim, hev›i pápin, sum mong onnur óttafull foreldur, longu bo›a› løgregluni í Havn frá, at sonurin var á festivalinum.

– Føroyingarnir á festivalinum hittust í stórum tali eftir vanlukkuna. Vit tosa›u um ta›, sum var hent, og móti morgni var lagi› betri. Men leygardagin sóu vit, at nógv fólk vóru farin heim, sigur Magnus Sørensen.



# Frá tónleiki til sorgarleik

*VANLUKKA. Ein av orsøkunum til sorgarleikin á Roskildefestivalin um, sum kravdi átta mannalív fríggjakvøldi›, kann vera vánalig ljó›dygd*



*Sorg í Roskilde. Nøkur ungfólk leggja blómur vi› pallin í Roskilde, har átta ungir menn vór›u kroystir til dey›is fríggjakvøldi›.*

Mynd: Scanpix/Nordfoto

Høgni Mohr

Lívgandi tónleikur broyttist til høpisleysan sorgarleik í Danmørk um vikuskifti›.

Fríggjakvøldi› doy›u átta ásko›arar, sum vóru til tónleikaframførslu hjá amerikanska rokkbólkinum, Pearl Jam á Roskildefestivalinum. Teir átta ungu menninir, i› vóru falnir til jar›ar, kvaldust, tá i› a›rir ásko›arar, i› vóru frá sær sjálvum, tra›ka›u á teir.

### Fleiri orsøkir

Teir umlei› tíggju sjónarváttarnir, i› hava gjørt vart vi› seg, hava greitt løgregluna á sta›num frá, at konsertin var sera ógvislig og at ásko›arafjøldin var nógv villari enn vanligt. Nógv fólk vór›u lyft upp um høvd og flutt aftur og fram millum hundra›tals hendur.

Ein onnur t‡›andi orsøk til sorgarleikin kann vera, at ljó›i› ikki var nóg gott. Ein sjónarvátti hevur alment bo›a› frá, at tveir av teimum fremstu hátalarunum ikki rigga›u, og at hetta fekk fólk í hópatali at flyta seg móti ø›rum hátalarum, i› rigga›u.

Fyribils benda allar vitnisfrágrei›ingarnar á, at stórur partur av mannfjøldini gjørdist sansaleysur av ræ›slu.

### Líkini kannast

Løgreglan í Roskilde er sera bilsin um, at bert menn doy›u í rokinum. Hóast nógvar kvinnur eisini vóru í ásko›arahópinum, hava tær eftir øllum døma megna› at sloppi sær undan ræ›uliga tr‡stinum

Ikki fyrr enn um eina viku ver›ur púra greitt um a›rar umstø›ur hava havt t‡dning í sambandi vi› tey átta lívlátini. Líkskur›arfólk fara m.a. at kanna, um og í hvønn mun teir átta vóru ávirka›ir av rúsevnum og rúsdrekka.

### Hvør hevur skuldina?

Tí›indini um vanlukkuna á Roskildefestivalinum fóru sum rótasúpan um alla Danmørkina um vikuskifti›, og skelkurin stendur sambært danskar fjølmi›lar vi›. Stóri spurningurin tykist vera, hvør skal hava skuldina fyri sorgarleikin.

Nógv hava bent vrei›i sína móti amerikanska tónleikabólkinum, sum er tiltikin fyri at fara ógvisliga fram undir konsertum sínum. Onnur eru í iva um, hvussu væl fyriskipa› framførslan hevur veri›. Og onkur teirra vil vera vi›, at vaktarhaldi› vi› pallin ikki var nøktandi.

### Skeiv dey›sbo›

Eisini hava fjølmi›lar sagt frá persónligum upplivingum í sambandi vi› syndarliga tilbur›in. Og ávísar frásagnir hava veri› lívgandi hjá summum, hóast sorgarstandin.

Eini norsk hjún í Stavanger fingu tey bo›, at sonur teirra, Bjarte Fossfjell, skuldi vera dey›ur av løsti undir konsertini hjá Pearl Jam. Løgreglan í Roskilde hev›i funni› gjaldkorti› hjá hesum unga manni uppi á einum av teimum dey›u. Men norski unglingurin, sum stó› fremstur í uppøstu mannamúgvuni undir konsertini, hev›i mist gjaldkorti›. Ein teirra, i› seinni lat lív, hev›i eftir øllum at døma funni› korti› og stungi› ta› upp á seg. Tískil vór›u dey›sbo›ini av misgávum send til Noregs.

Bjarte Fossfjell ringdi sjálvur til foreldrini eftir skakandi hendingina. Hann visti ikki, at tey longu tá høvdu fingi› dey›sbo›ini.

Eisini danski mentamálará›harrin, Elsebeth Gerner Nielsen, kendi óvissuna á sær, tímarnar eftir vanlukkuna. Hon eigur 16 ára gamla dóttur, sum ikki lat frætta frá sær úr Roskilde, á›ur enn fleiri tímar eftir vanlukkutilbur›in.

### Seinasta heilsan

Teir i› lótu lív vóru tríggir danir (tveir 17 og ein 22 ára gamal), tríggir sviar (20, 21 og 22 ára gamlir), ein ni›urlendingur (23 ára gamal) og ein t‡skari (26 ára gamal). Tey avvarandi hava øll fingi› dey›sbo›ini. Bo› eru eisini farin til Avstralia um, at ein 22 ára gamal ma›ur úr Melbourne er illa særdur.

Seinastu heilsanina til teir dey›u á Roskildefestivalinum bar danski tónleikabólkurin, D.A.D., fram sunnukvøldi›, tá i› festivalurin enda›i. Hetta hendi á sama palli, har Pearl Jam gjørdi burtur úr sær fríggjakvøldi›.

